## DAGSINS MEINING

# Mangt er í neyðini nýtt

Framløga Miðfloksins í SvF mánakvøldið avdúkaði, at andsøgn er í politikki floksins. Flokkurin hevur átt lívið í tí samgongu, ið er farin í søguna. Henda samgonga hevði fullveldi sum sítt aðalmál. Nú hevur Miðflokkurin tveitt fulveldispolitikkin yvir borð og talar í staðin fyri eini fíggjarligari uppgerð við Danmark. Hví syrgdi hesin flokkur ikki fyri hesi uppgerð, tá hann sat við buktini og báðum endunum í Tinganesi? Her hongur ikki saman.

Formaður Miðfloksins gjørdi nógv burtur úr hesum at eggja fólki at giftast. Tað skulu fylgja ítøkiligir fyrimunir við at vera giftur, og hetta kann bert merkja, at tey, ið liva saman uttan pappír ella einsamallir uppihaldarar, skulu revsast við ikki at verða stuðlað og hava sosialar og fíggjarligar fyrimunir. Hvat viðkemur tað politiskum flokkum, hvussu fólk liva teirra lív, og hvat er hetta fyri politikkur, ið leggur upp til at diskriminera partar av landsins borgarum, tí teir ikki liva upp til Miðfloksins moralska standard? Hvønn moralskan rætt hevur ein politiskur flokkur til at tvinga sínar normar niður yvir høvdini á øllum føroyingum?

Flokkurin hevur eisini roynt at skapa eina øsing um fosturtøku – hóast Føroyar liggja í lægra endanum við fosturtøkum samanborið við onnur lond í Vesturheiminum. Svar floksins var, at tær kvinnur, ið koma fyri barn, skulu fáa hjálp og góð tilboð frá samfelagnum. Hetta kann bert vera gott. Men her hongur kortini ikki saman hjá Miðflokkinum, tí beint frammanundan hevði formaðurin gjørt greitt, at familjupolitikkurin skal vera hjúnabandsfremjandi. Av hesum fylgir, at einsamallar møður skulu einki gott vænta frá Miðflokkinum. Har er bert fordøming at heinta. Tá tað ivaleyst er so, at tær flestu kvinnur, sum velja fosturtøku, eru ógiftar, so kann "familjupolitikkurin" hjá Miðflokkinum ikki hjálpa hesum, sum fyri alt tað ivaleyst hava mest hjálp fyri neyðini. Spurdur, hví Miðflokkurin ikki hevði gjørt nakað við fosturtøkuspurningin var svarið tað, nú hann hevði havt politiskt vald, at tað var skyldað uppá Danmark. Hetta svar var ov vánaligt, tí einki hevur forðað Miðflokkinum at broyta donsku abortlóggávuna í Føroyum. Lagt kann verða afturat, at danir umsita ikki almannamál, so á tí økinum kundi flokkurin havt gjørt síni sjónarmið og krøv galdandi, um nakað álvara var í øllum hesum við meira hjálp til kvinnur, ið velja fosturtøku. Her vóru eingir danir at skylda uppá.

Tað, sum Miðflokkurin ger, er, at hann leggur eftir bólkum í samfelagnum, ið frammanudnan eru marginaliseraðir og roynir at stoyta hesar bólkar longur út í samfelagsins útjaðara. Samkynd, einamallir uppihaldar, kvinnur, ið kenna seg noyddar at velja fosturtøku, medmenniskju, ið frammanundan hava tað trupult, skulu einki gott vænta sær uttan fordøming. Her skal steinur leggjast oman á byrðu. Hesin politikkur er eyðkendur fyri tað høgrapopulistiska rák, sum í løtuni er víða hvar í Vesturheiminum, eitt nú í Danmark Jú mangt er í neyðini nýtt. Tá flokkar uttanlanda leggja eftir ávísum fyri ikki um at tala verjuleysum samfelagsbólkum, er hetta vanliga dømi um hugsjónarligt fátækdømi eins væl og moralska og politiska ómegd. Miðflokkurin er í so máta einki undantak. Jenis er svarið skrivaðu samstarvfelagarnir so fegnir, tá samgonga varð skipað seinast. Gud viti, hvat teir hugsa í dag.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Eitt sterkt vinnulív framleiðir vøkstur og vælstand og vælferð

**Atli Hansen**



Einki kemur burtur úr ongum - uttan lummaull.

Hetta er ein viðurkendur lærusetningur. Tað kann tí undra undra, at so lítið verður gjørt burtur úr at viðgera korini hjá vinnulívinum í einum valstríði. Her verður bert tosað um tað, sum kemur frá vinnulívinum, nevniliga til lívsins uppihald, vælferð, útbúgving og íløgur í framtíðina. Her verður bara tosað um mjólkina og einki um kúnna.

Tað mesta av Eysturoynni hevur hesi seinnu árini upplivað ein sterkan búskaparligan vøkstur skaptur av einum vælvirkandi og dynamiskum vinnulívi. Hetta hevur bygt ein vælstand og eina vælferð sum ongantíð fyrr í søguni, tí at okkara kommunir hava havt eitt vakið eyga fyri at hjálpa til og at skapa møguleikarnar.

Gøtu kommuna hevur verið ein týðandi partur av hesi menning og sum borgarstjóri, vald á listanum hjá Sambandsflokkinum, hevur Halldóra Ranghamar staðið á odda fyri tí góðu gongdini í okkara sókn.

Halldóra stillar nú upp til løgtingsvalið fyri Sambandsflokkin í Eysturoy og flokkurin hevur í henni fingið eitt valevnið við nógvum førleikum. Hon er ung, hon er røsk, hon er skilagóð og hevur áræði. Hon er ein vinnari. Hennara útbúgving og hennara royndir í kommunalum arbeiði í eini vinnulívskommunu vilja saman við hennara persónligu egin-leikum gera hana til eitt sterkt boð upp á ein sess á sambandsbonkinum.

Og har vil hon hava nógv hugskot til at menna og stimbra okkara vinnulív - tí vinnulívi, sum skal vera grundarlagið undir okkara vælstandi og vælferð - undir okkara framtíð.

Tað er tí við góðum huga, at eg heiti á allar eysturoyingar um at geva Halldóru Ranghamar - og við henni eisini Sambandsflokkinum - góðan stuðul á valinum 20. januar 2004.

Sambandsflokkurin - ein vinnulívsflokkur.

Gott val og gott nýggjár

# Góðan morgun, Fólkaflokkurin!

**Napolion Magnussen**

Hava nú hoyrt fleiri fólkafloksmenn rópa um, at teir fara at arbeiða fyri at smábátar skula takast úr fiskidagaskipanini, entá ein av teirra fiskimálaráðharrum hesi seinastu árini hevur sagt tað.

Haldi hetta er sera nasadjarvt at koma við, nú teir í átta ár hava havt fiskivinnumál um hendi. Havi sjálvur tosað við ein av teirra fiskimálaráðharrunum hesi árini, hann segði, at tað snøgt sagt ikki bar til, tí at man mátti hava allar fiskidagar undir skipanini fyri ikki at undirgrava skipanina.

Ein kann tí spyrja, hví teir koma við hesum. Og svari má verða: Útgjaring, og aftur útgjaring.

Tit skula halda munn um tað, tit kundu havt gjørt tey seinnu árini og ikki gjørdu! Hatta er at halda Føroya fólk fyri rukku, so haldi munn!!

**Góðan nátt, Tjóðveldisflokkurin!**

Hava tit ikki innsæð tað enn? Meirilutin av Føroya fólki ynskir ikki loysing eftir tykkara leisti! Meirilutin raðfestur eitt gott og liviligt samfelag fyrst, og so hvørt vit hava ráð, skula vit yvirtaka restina, tað er bara so!

Høvdu tit vilja svølgt eitt sindur av tykkara ærukæru undirlutakenslum yvir fyri dønum, vóru tað 80% av fólkum, sum tóku undir við tí. Og kalli so ikki nakran »botn konservativan«, tí tað eru tit so avgjørt sjálvir!

Tað, ið nógv undrast á, er, at tit ikki hava skaffað eina einasta nýggja krónu í landskassan, ongar nýggjar inntøkur eru funnar, bara hóttanir um fleiri avgjøld, tað er fakta!

Og til alla lítlu samgongu: Latið vera við at lova nakað nú, sum tit lættliga kundu havt gjørt, men sum tit ikki gjørdu, meðan tit sótu.

# Viðmerking til valsending Fólkafloksins í ÚF 12.01.04

**Dánial Johansen**

Hví gjørdist Óli Breckmann so uppøstur, tá tiltikna málið um løgmann bleiv borið upp á mál?

Sjálvur citeraði Óli: Sig bert eina lygn nóg ofta, so verður hon sannleiki til endans.

Er tað kanska tað, løgmaður roynir, tá hann fer at bera seg undan við »feilbóking« og »truplar umstøður« í staðin fyri at ganga í seg sjálvan?

Fólkaflokkurin hevði óivað staðið seg betur, um bæði løgmaður og Jørgen Niclasen høvdu viðgingið síni mistøk og biðið Føroya fólk um umbering. Tá høvdu fólk trúð uppá, at flokkurin ikki gekk inn fyri óreglusemi.

Kanska er tað sum í PIPAR & SALT. Tað er »**tíðin**«, sum ger tað, og Cognac bleiv til »**kongabomm**«, og at SKÁL bleiv til »**Hey**«.

Ótrúligt, at so nógv hóast alt stuðla flokkinum.

Skil tað hvør ið kann.

**Hey!!!**


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Valsendingar í SvF

**Liss Joan Hansen**
*Funningsfjørð*

Havi seinastu kvøldini hugt at valsendingunum í SVF, har Øssur Winthereig er vertur. Má viðganga, at hetta hevur verið eitt skuffilsi av teimum heilt stóru. Mest av øllum havi eg undrast á, at Øssur spyr luttakarnar um nakað sum helst, tí hann vil slett ikki hoyra tey svara uppá tað, hann spyr tey um!

Í gjárkvøldið bar so av. (hósdag 8 januar) Hetta kvøldið var valsendingin úr Eysturoynni, og tað fyrsta evnið var um vatnorkuútbyggingina hjá SEV. (rev)álvaratos!

Fyrst eina samrøðu við dagrøktaraleiðara, sum ikki vildi missa spæliplássið hjá børnunum í dagstovninum á Oyri, alt gott um tað. Men so segði hon at vatnorkuútbyggingin er í lagi, um SEV vísir hóvsemi, tá teir taka vatnið! Vælsignaða eigi teg, koyr tær ein túr til Funningsfjarðar, og hygg eftir hvussu hóvligir SEV eru, tá teir fara at taka vatnið úr áðunum. Hyggjuráðini eru nokk at taka ein lupp ella, enn betri, mikroskop við tær, um tú altso ætlar tær at síggja nakað vatn í áðunum við vestaru síðu av Funningsfirði. Gongur tú niðaná fjøllini, oman fyri har byrgingingarnar í áunum eru, sær tú, at allar smáar grøvir og veitir eisini eru veittar til vatnúttøkini hjá SEV. Tað var eisini sagt her á leiðini, áðrenn SEV tók áirnar, at teir bara skuldu taka ein part av teimum, men her gongur sjón fyri søgn. Nei, SEV tekur hvønn ein dropa…..hví ólukkan skulu teir ikki gera tað, tá vatnið er tað, teir eru farnir eftir?

Síðan eitt umfar til luttakarnar uppá 1 1/2 minutt at tosa í, og so nakrir spurningar frá Øssuri Winthereig. Bara tað hann spyr um, og einki annað kann sigast í sendingini. Eingin tíð til at svara, luttakarnir verða avkvettir mitt í einum svari, og sleppa als ikki at rættað tær skeivu uppfatanir Øssur fær fólk til at halda, at valevnini kanska hava sagt! Hví skal Kyoto-sáttmálin verða við til at steðga SEV útbyggingunum? Hasin eini motorurin, sum SEV nýtir til hesa vatnorkuna, hevur ikki so nógv co2-útlát, at tað gerð nakran mun uppá vakstrarhúseffektina, samanborið við árinið á nærumhvørvið av, at áirnar verða turrlagdar!

Tað ljóðar sera gott at siga, at tað í løtuni verða gjørdar árins-kanningar við Funningsfjørð, og at vit fáa eitt svar uppá tær skjótt. Men hvat er hetta svarið vert? Kanningarnar byrjaðu ikki fyrr enn eftir at vatnið varð tikið úr áunum og nærumhvørvinum. Hugsa tær, at ein maður hevur eina langa fjøl, sagar eitt petti av og brennir tað. Koyrir síðan øskuna burtur, og biður ein annan mann koma at máta hvussu lang fjølin var, áðrenn hann sagaði og brendi pettið av fjølini. Hvussu góður er møguleikin fyri, at tann seinni maðurin finnur útav upprunaligu longdini á fjølini? Hann hevur ikki møguleika at brúka eygamál, tí hann hevur ikki sæð fjølina fyrr enn eftir at hon er stytt, og eigarin hugdi ikki at hvussu long fjølin var áðrenn hann sagaði.

Tí kann sigast, at tær sokallaðu árinskanningarnar eru reint spæl og gitingar, sum ikki kunnu brúkast til nakað sum helst. Tær eru umleið líka nógv verdar sum tann burturbeinda øskan av omanfyri nevndu fjølini.

# Føroyar skulu vera fyri allar føroyingar

**Oddfríður Marni Rasmussen**
*Rithøvundur*



Føroyar skulu vera fyri allar føroyingar. Soleiðis verður sagt um tað føroyska samfelagið. Miðflokkurin hevur lagt valskránnað fram, og enn eina ferð sæst, at Føroyar eru IKKI fyri allar føroyingar. Listafólk og samkynd eru enn ikki vælkomin at liva og starvast her á landi.

Miðflokkurin vil, at sparast skulu 69 milliónir á mentanarøkinum, tí, sum teir siga: Mentanin eigur ikki at vera ein útreiðsla fyri føroyska samfelagið. Mentan hevur ongantíð verið ein útreiðsla fyri samfelagið. Tað er eyðsæð, at peningurin, sum mentanin letur í landskassan, ikki er har beinanvegin, men ferðafólk, sum koma at vitja hetta vakra landið, vitja tað tí, at tey hava eitt gott forhold til føroyska mentan - og tey leggja pening eftir seg. Føroyskur tónleikur verður spældur kring allan knøttin. Bøkur verða týddar til onnur mál. Listafólk verða innstillað og vinna virðislønir. Ítróttarfólk vinna heiðursmerkir og føroyskum listafólki verður sýndur heiður í egnum landi, og tað er alla æru vert.

Tað ljóðar á miðflokkamonnunum, at vit, sum fáast við at skapa list, ikki hava familju, og tí ikki kunnu koma undir familjupolitik, at vit ikki hava brúk fyri barnagarðsplássum, at vit ikki drekka mjólk, og at vit ikki hava arbeiði, vit eru bara ein útreiðsla. Tá ið eg ikki skrivi ella eri saman við mínari familju, havi eg eitt vanligt borgarligt starv, sum eg eri sera væl nøgdur við.

Eg kann fortelja miðflokkamonnunum, at tá ið eg gevi eina bók út, so hendir tað seg at eg kanska fái løn í nakrar mánaðir tá ið eg skrivi. Eitt bókarforlag skal geva hana út. Síðani lati eg prentaranum bókina til umbrótingar. Bókin verður innbundin. Hon verður latin bókasølunum og tey selja hana til ein lesara. Eru tit greiðir yvir hvussu nógv fólk hava bókina á hendi áðrenn lesarin endaliga keypir hana? Ógvuliga nógv fólk, sum øll gjalda skatt, MVG, og løn til starvsfólk. Um eg ikki fekk løn fyri mítt arbeiði (ja, hetta er eitt arbeiði) vildi verið tað sama sum, at ein handverkari ikki fekk løn fyri at byggja eini hús, ella at ein flakakvinna ikki fekk løn fyri at flekja fisk. Øll hava vit tað til felags, at vit levera eitt produkt til ein keypara. Men nú er tað so viðvíkjandi listini, at marknaðurin í Føroyum er avmarkaður og tí má hon stuðlast alment, annars verður arbeiðið ólønt. Kanska hetta er vælgerandi arbeiði og átti tí at verði skattafrítt, sum eitt nú í Írlandi, har listafólk ikki gjalda skatt av teimum fyrstu 100.000 krónunum. Um skapandi og útinnandi listafólk ikki fáa henda vælfortjenta stuðul frá landinum, sum vit eru sera takksom fyri, so enda vit á almannastovuni. Eru vit kanska tá eitt mál hjá miðflokkinum at arbeiða við?

Tjóðpallur Føroya verður veruleiki. Tað var jú bert ein tingmaður, sum atkvøddi blankt og ein, sum atkvøddi ímóti, so gamla tingmanningin vildi føra Tjóðpall Føroya út í verkið. Vónandi fer ein nýggj tingmanning ikki at mótmæla hesum.

Eitt og hvørt land, sum hevur respekt fyri síni egnu søgu og sínum fólki, eigur at loyva gransking. Hetta kann vera við til at menna okkum sjálvi og onnur við.

Loftmiðlarnir mugu eisini skifta út gamla útgerð og fylgja við á tí tøkniliga økinum. Teir hava brúk fyri góðum kørmum og góðari útgerð, og tá ið útgerðin er vorðin ov gomul, kann hon seljast til onkran, sum ætlar sær at seta á stovn eina sjónvarpsrás.

# Veljið bara ikki svart!

**Eyðun Egholm**

Tey sum hava fylgt eitt sindur við, eiga at hava lagt merki til, hvussu illa Sambandsflokkurin er komin frá sínum valsendingum. Flokkurin hevur t. d. ikki skil á, hvat tað er, tey eru við at broyta, hvørki viðv. skattinum ella viðurskiftunum ímillum Føroyar og Danmark.

Føroyngar, tit eru vónandi skilabetri enn tað, sum veljarakanningin vísir.

Frælsar Føroyar
í svartari miðøld
- hvat er tað?

Føroyingar
eru framvegis meira
enn bara menn

Kvinnur til dømis
- og samkynd

Veljið tey sum virða
mannarættindini

**Bergtóra Hanusardóttir**

# Til Miðflokkin

**Durita Dam**

Teir seinastu dagarnir havi eg, við stórum áhuga, fylgt við í kjakinum um samkynd.

Mín fyrispurningur snýr seg um, hvør viðgerðarháttur Miðflokkurin ætlar skal verða nýttur, fyri at grøða samkynd. Hvar skal viðgerðin fara fram? Vita tit um nakran samkyndan, ið hevur áhuga í hesi viðgerð?

Eg skal leggja afturat, at eg ongantíð havi hugsað um samkynt sum sjúk, men bert sum ein part av tí menniskjaliga margfaldni, sum Várharra hevur skapt. Annars haldi eg at orðið »kynsvillingur« er eitt sera óetiskt og »happandi« navn.

# Sambandslummaroknarin

**Jón Guttesen**

Lisbeth eigur ein Sambandslummaroknara og hann hevur verið frammi
Góður er hesin Sambandslummaroknari, einamest í einum valstríði.
Tí Sambandslummaroknarin veit Lisbeth at siga, at um hon sigur 40 heldur enn 60 (á "Eyka arbeiði")
Ja so fara pengar at *floyma* í Føroyum.

Sambandslummaroknarin kann neppa Lisbeth fortelja
Um toskur tá verður meiri ella um prísir tá verða hægri
Ej heldur um laksur tá verður dýrur ella um svartkjaftur tá verðir eftir
Nei Sambandslummaroknarin veit kanska at siga at tá fara vit at klippa okkum nakað nógv oftari!

Ja sjálvt hjá tí allar, allar gløggasta mann búskapur verða sverur
Og hjá Lisbeth, ja, heldur sverari
Tí hevur Sambandslummaroknarin hjá Lisbeth
Ein knøtt sum lummaroknarin hjá tær og mær ej hava

Ein knøtt sum fær øll roknistykkir at ganga upp
Um enn bert fyri eina tíð
Sum fær øll reyð tøl at blíva svørt
Um enn ikki permanent

Sum fær teg at gloyma alt um skynsemi og sjálvbjargni, ýðni og fullveldi

Ein knøtt við drotningakrúnu á
Eg haldi tað er á henda knøtt
Lisbeth hevur havt fingurin á!